UTTAN ÚR HEIMI

# Al-Qaeda fyrireikar álop á USA

*Felagsskapurin al-Qaeda hjá bin Laden hóttir nú aftur USA við atsóknum*



**Ein maður, sum sigst vera talsmaður hjá al-Qaeda, sigur, at felagsskapurin fyrireikar eitt umfatandi álop á USA.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Sambært bretska blaðnum The Guardian hevur eitt arabiskt blað í London havt samband við ein mann, sum eitur Thabet bin Qais, og sum sigur seg vera tann nýggja talsmannin hjá al-Qaeda.

Thabet bin Qais sigur við arabiska blaðið, at yvirgangsfelagsskapurin er umskipaður, og at leiðslan hevur fingið nakrar nýggjar limir, sum amerikanararnir ikki kenna.

- Amerikanararnir hava bara gamlar upplýsingar, og tað fer at taka teimum drúgva tíð finna útav, hvussu al-Qaeda er skipaður í dag, sigur bin Qais sambært The Guardian.

Tann nýggi talsmaðurin heldur ikki, at felagsskapurin hjá Osama bin Laden er viknaður eftir atsóknirnar tann 11. september í 2001, og hann ávarar um nýggjar atsóknir.

- Eingin skal vera í iva um, at vit fara at søkja at USA aftur. Tað heilaga kríggið fer at halda fram, sigur Thabet bin Qais.

Arabiska blaðið, sum hevur tosað við tann nýggja talsmannin hjá al-Qaeda, skrivar, at talsmaðurin vendi sær til blaðið fyri at vísa aftur amerikanskum tíðindum um, at al-Qaeda hevði lagt ætlanir um at søkja at amerikansku sendistovuni í Karachi í Pakistan. Sambært talsmanninum hevur al-Qaeda onga slíka ætlan.

George W. Bush, forseti og ovastin í fregnartænastuni CIA, Robert Mueller, vildu fyri nøkrum døgum síðani vera við, at USA er í ferð við at vinna bardagan ímóti yvirgangi. Teir vístu á, at fleiri av leiðarunum í al-Qaeda eru tikinir ella deyðir.

# Íslendingar og norðmenn stríðast aftur um fiskirættindi

**Íslendsk skip ætla sær at fiska sild í verndarøkinum við Svalbard. Gera tey tað, verða tey tikin, siga norðmenn. Men íslendingar slaka ikki.**

FISKIRÆTTINDI
*Árni Joensen*

Íslendingar og norðmenn eru aftur ósamdir um fiskirættindi. Hesaferð snýr tað um rættindini hjá íslendskum skipum at fiska sild í verndarøkinum við Svalbard.

Londini hava tingast um ein sáttmála um sildina, men uttan úrslit. Íslendingar hava gjørt greitt, at teir fara at lata síni skip fiska sild í verndarøkinum við Svalbard, sjálvt um eingin sáttmáli er.

Men tað fara norðmenn ikki at góðtaka. Stjórin í reiðarafelagnum, Audun Maråk, sigur við norska útvarpið, at koma norsk sildaskip inn í verndarøkið, kann tað ikki bera annað í sær, enn at tey verða tikin.

Í íslendska reiðarafelagnum er støðan ein onnur, tí har siga tey seg vera sannførd um, at Svalbardsáttmálin gevur íslendingum rætt til at fiska í verndarøkinum. Stjórnin í Reykjavík er samd við reiðarafelagnum, og Dávid Oddsson, forsætisráðharri, sigur við norska útvarpið, at sleppa íslendsku skipini ikki at fiska sild í verndarøkinum, fer Ísland at leggja málið fyri altjóða dómstólin í Haag.

Hesum hava norðmenn roynt at sloppið undan fyrr, tí ein viðgerð í altjóða dómstólinum kann enda við, at Noreg missir ræðið á fiskastovnunum kring Svalbard, sigur norska útvarpið. Men í reiðarafelagnum mæla tey stjórnini frá at slaka.

- Íslendingar hava altíð nýtt hóttanir fyri at fáa sum mest burturúr. Tað gjørdu teir eisini fyri at sleppa at fiska tosk í Barentshavinum á sinni, men nú er tíðin komin, til at Noreg sigur nei, sigur Audun Maråk.

## Sinnaður at samráðast

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, sigur nú, at hann er til reiðar at samráðast við Sýrialand um ein friðarsáttmála, men hann leggur kortini treytir við.

Við ísraelska sjónvarpið sigur Sharon, at tað er greitt, at sýriska stjórnin fer at leggja nøkur krøv fram, men tað fer Ísrael eisini at gera, sigur hann. Sýrialand hevur fyrr sagt, at landið er sinnað at samráðast við Ísrael, men at samráðingarnar skulu byggja á ST-samtyktir. Hesum hevur Ísrael fyrr víst aftur.

Seinast í nítiárunum samráddust Ísrael og Sýrialand, men samráðingarnar slitnaðu, tí partarnir kundu ikki semjast um Golan-herurnar, sum Ísrael hersetti í 1967, og sum Sýrialand vil hava aftur.

## Skipið var fult av kokaini

Bretskir og spanskir tollarar, sum fóru umborð á ein gamalt herskip úr Honduras hósdagin, gjørdu rættiliga kvetti.

Trollararnir vóru við einum bretskum herskipi, sum steðgaði tí gamla honduranska herskipinum úti í Atlantshavinum. Tá tollararnir fóru umborð at kanna skipið, funnu teir ikki minni enn 3,6 tons av kokaini. Farmurin fylti so nógv, at sjálvt koyggjurnar vóru fullar, og tí noyddist manningin at sova á brúnni. Bretska tollvaldið heldur, at kokainið er næstan tríggjar milliardir krónur vert á ólógliga marknaðinum.

Skiparin á honduranska herskipinum er úr Dominikanska Lýðveldinum, og hinir av manningini eru grikkar. Teir sita nú allir í varðhaldi í Spania. Sponsku myndugleikarnir halda, at skipið kom úr Kolombia, og at tað var á veg til Spania við ólógliga farminum. Á sponsku útnyrðingsstrondini eru nógvar smár víkir, og myndugleikarnir halda, at skipið ætlaði sær inn á eina av hesum víkunum at lossa farmin í land.

## 60.000 flýdd

Seinastu fjúrtan dagarnar eru umleið 60.000 sivilfólk flýdd úr Demokratiska Lýðveldinum Kongo til grannalandið Uganda.

Uganda hevur havt hermenn í Kongo, men síðani stjórnin herfyri gjørdi av at taka hermenninar heimaftur, eru ymsir ættarbólkar í Kongo farnir at berjast ímóti hvør øðrum, sigur ugandiski verjumálaráðharrin. Tey 60.000 fólkini eru flýdd undan bardøgunum.

Ugandiski varaforsætisráðharrin, Moses Ali, sigur, at landið er ikki ført fyri at taka ímóti teimum nógvu flóttafólkunum, og hann hevur tí biðið umheimin um mat, tjøld og aðra neyðsynjarhjálp. Samstundis stúra myndugleikarnir fyri, at uppaftur fleiri fólk fara at flýggja inn um ugandiska markið.

## Hartar USA og Kuba

Kilski rithøvundurin Isabel Allende leggur USA og Kuba undir at bróta altjóða mannarættindini.

- Eg kann ikki góðtaka, at USA brýtur mannarættindini í Irak, og eg kann heldur ikki góðtaka framferðina hjá kubansku myndugleikunum, sigur Isabel Allende. Tann 60 ára gamli rithøvundurin, sum býr í USA, vil vera við, at nógvir amerikanarar eru ímóti krígnum í Irak, og at dagliga eru fleiri mótmælisgongur í amerikanskum býum. Samstundis fýlist hon á, at amerikansku sjónvarpsstøðirnar, sum fylgdu krígnum í Irak, vístu at kalla ongantíð myndir av deyðum irakum, og at ránið á tjóðarsavninum í Bagdad varð valla tikið upp á tunguna.

Isabel Allende ger greitt, at hon góðtekur heldur ikki, at kubansku myndugleikarnir gjørdu av at fongsla 75 politiskar mótstøðumenn herfyri. Brot á mannarættindini kunnu ikki góðtakast, sama hvør fremur tey, og hvar tey verða brotin, sigur hon.